**FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ**
The Faroe Islands Fisheries Inspection



# 2. MEISTARI TIL FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

Eitt starv sum 2. meistari við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst, at seta sum skjótast.

**Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávur**
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúminum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Fremja viðlíkahaldið sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinmeistari á 2. stigi.
- Fyrimunur við 3 ára maskinmeistaraútbúgving
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni
- Prógv, so sum trygdarskeið, eldsløkking, fyrstuhjálp, vinnukavari og onnur ið eru viðkomandi fyri starvið. Fyrimunur er við gildugum prógvum.
- Aldur og heilsu til at gerast vinnukavari. Fyrimunur men ikki krav.

**Setanartreytir**
Starvið er lønt í 28. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistara-felagið. Setanarreytir eru eisini sambart avtalu millum áðurnevndu. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið. Starvsheitið er 2.meistari.
Tann ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við: CV, avrit av prógvum fyri førleikakrøv og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 12. november 2007 kl. 1400.

**Umsóknir skulu sendast til**

**Fiskiveiðieftirlitið**
Postsmoga 347
110 Tórshavn
att: Jóannes Heimustovu

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 31 10 65 og tosa við Jóannes Heimustovu, samskipara. Henda lýsing er eisini á heimasíðuni www.fisk.fo.

www.fisk.fo



# Hugsa um dekkini, nú veturin kemur

**- so ert tú tryggari**

Veitst tú, at upp móti 50% fleiri skaðar henda í ferðsluni um veturin í mun til um summarið.

**Minst tí til at:**
- Foyrurnar í dekkunum skulu vera í minsta lagi 1,6 millimetrar, men tað verður viðmælt at skifta dekkini, tá foyrurnar eru minni enn 3,5 millimetrar. Hetta er galdandi fyri bæði vetrardekk og dekk við píkum.
- Loyvt er at brúka píkadekk frá 16. oktober til og við 30. apríl.
- Bilar tyngri enn 3500 kg eiga at hava ketur til taks.
- Tryggja tær nøktandi vegatak í mun til ferðið.
- Umstøðurnar kunnu broytast munandi, hægri tú kemur upp. Ansa tí eftir, tá tú til dømis koyrir millum bygdir.

www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

W W W . S O S I A L U R I N . F O